Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði

EIÐIS KOMMUNA

Bygdaráðsfundur

---

Fundur nummar: 5/2025
Fundardagur: týsdagin kl. 18:00 29.apríl 2025
Viðmerking: Fundarskrivari : Guðrun Ejdesgaard

Møtt:

Jógvan í Skorini

Tove Kruse Samuelsen

Tonny Snogebæk Kruse

Fróði Reinert Petersen

Olaf Fríðheim

Sigurður Eiríksson

Kristian Martin Juul

Fráboðan, ikki møtt:

| Málnummar | 473 | Journalnr. | **211-2-2025** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Eykajáttan 1. viðgerð | | |
| Til samtyktar | Til bólk 1 – Kommunal fyrisiting kr. 600.000 fíggja av meirinntøku/innis.<br><br>Frá bólk 3 – børn og ung kr. 6.000.000 til bólk 6 – teknisk mál<br><br>Til bólk 6 – teknisk mál kr. 300.000 fíggja av meirinntøku/innistandandi | | |
| Viðmerking | Einmælt samtykt | | |

| Málnummar | 474 | Journalnr. | **548-3-2025** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Umsókn um marknaumskipan matr. 108 og 150 á Eiði | | |

| | |
|---|---|
| Til samtyktar | Einmælt samtykt at *viðmæla marknaumskipanini.* |
| Viðmerking | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Málnummar | 475 | Journalnr. | **542-1-2025** |
| Málslýsing | Umsókn um byggiloyvið á matr. 180e á Eiði | | |
| Til samtyktar | Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi,sambart innsendu tekning, vísandi til viðmæli frá Brim og grannaváttan. | | |
| Viðmerking | Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Málnummar | 476 | Journalnr. | **324-3-2025** |
| Málslýsing | Frítíðarskúlin undir Kolshjøllum | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði



| | |
|---|---|
| Til samtyktar | Fíggjarnevndin mælir til at byrja arbeiðið við frítíðarskúla. Mælt verður somuleiðis til at taka samráðingar upp við Sp/f Búð, um at standa fyri arbeiðnum við frítíðarskúlan. Um sáttmálin við Sp/f Búð verður til veruleika, verður hesin sáttmálið at rokna at koma í staðin fyri sáttmálan um byggingina niðri í Hólma, sum síðani skal fella burtur. Metir man at úrslitið frá samráðingunum ikki eru nøktandi, verður arbeiðið boðið út. Evt. Sáttmálið verður lagdur til bygdaráðið til endaliga støðutakan. Formansskapurin saman við Olaf Fríðheim úr fíggjarnevndini stendur fyri samráðingunum.<br><br>**Broytingaruppskot frá Fróða Reinert Petersen:**<br><br>Heitt verður á borgarstjóran, at seta gongd aftur á byggingina av húsinum Millum Vatna, møguliga í einari tillagaðari útgávu.<br><br>**Atkvøða um broytingaruppskotið:**<br><br>1 fyri Fróði Reinert Petersen 5 ímóti, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Kristian Martin Juul, Tove Kruse Samuelsen og Jógvan í Skorini.<br><br>Um hetta broytingaruppskot ikki vinnur frama, so seti eg fram broytingaruppskot um, at heitt verður á borgarstjóran, at fáa til vega veruleikakenda kostnaðarmeting fyri at byggja frítíðarskúla undir Kolshjøllum, áðrenn støða kann takast til hetta mál.<br><br>**Atkvøða um broytingaruppskotið:**<br><br>1 fyri Fróði Reinert Petersen 5 ímóti, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Kristian Martin Juul, Tove Kruse Samuelsen og Jógvan í Skorini.<br><br>**Til atkvøðugreiðslu:**<br>At fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini.<br><br>5 fyri Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Kristian Martin Juul, Tove Kruse Samuelsen og Jógvan í Skorini, 1 ímóti Fróði Reinert Petersen |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði



| | |
|---|---|
| Viðmerking | Arkitekturin kom á fundin at greiða frá bygninginum.<br><br>Tonny S. Kruse metir seg at vera ógegnigan. Einmælt samtykt av bygdaráðnum. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Málnummar | 477 | Journalnr. | **544-4-2025** |
| Málslýsing | Vegurin niðan undir Kolshjallar | | |
| Til samtyktar | Fíggjarnevndin mælir til at byrja arbeiðið við vegi og lendisarbeiðið skjótast gjørligt. Mælt verður somuleiðis til at taka samráðingar upp við Sp/f Búð, um at standa fyri arbeiðnum við vegnum og lendisarbeiðnum. Um sáttmálin við Sp/f Búð verður til veruleika, verður hesin sáttmálið at rokna at koma í staðin fyri sáttmálan um bygginginа niðri í Hólma, sum síðani skal fella burtur. Metir man at úrslitið frá samráðingunum ikki eru nøktandi, verður arbeiðið boðið út.<br>Evt. Sáttmálið verður lagdur til bygdaráðið til endaliga støðutakan.<br>Formansskapurin saman við Olaf Fríðheim úr fíggjarnevndini stendur fyri samráðingunum.<br><br>**Broytingaruppskot frá Fróða Reinert Petersen:**<br><br>Heitt verður á borgarstjóran, at fáa til vega eina veruleikakenda kostnaðarmeting av vegagerð og lendisarbeiði, áðrenn støða kann takast til hetta mál.<br><br>**Atkvøða um broytingaruppskotið:**<br><br>1 fyri Fróði Reinert Petersen, 5 ímóti, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Kristian Martin Juul, Tove Kruse Samuelsen og Jógvan í Skorini.<br><br>**Til atkvøðugreiðslu:**<br>At fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini.<br><br>5 fyri Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Tove Kruse Samuelsen, Kristian Martin Juul og Jógvan í Skorini, 1 ímóti Fróði Reinert Petersen | | |
| Viðmerking | Arkitekturin kom á fundin at greiða frá vegnum.<br><br>Tonny S. Kruse metir seg at vera ógegnigan. Einmælt samtykt av bygdaráðnum. | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði



Fundur lokin kl. 18.50

**Viðmerking:**

7 áhoyrarar

Fundarfrágreiðingin er skrivað í fundarbókina og váttað av øllum møttum bygdaráðslimum

**Aðrar viðmerkingar:**

Jógvan í Skorini, borgarstjóri